TALGILDU FØROYAR
01100110 01101111

Samleikin á geyma

Ger telduna klára til geyman

Henda vegleiðingin er ætlað at hjálpa tær, ið brúkar Samleikan á geyma og skalt hava forritið, **Smart ID Desktop App**, á telduna.

Øll, sum brúka Samleikan á geyma, skulu hava Smart ID Desktop App á telduna.

Les meira á www.samleikin.fo/geymi

Tak Smart ID Desktop App niður

1. Tak forritið niður á heimasíðuni www.samleikin.fo/geymi

GG: tú skalt taka forritið niður av heimasíðuni hjá Samleikanum og ikki frá Microsoft Store.



2. Far til Stifinder / File Explorer

*Skriva **Stifinder/File Explorer** i leititeigin niðast á skerminum og vel **Åbn/Open***



3. Dupultklikka á forritið, tú hevur tikið niður

- *Vel **Overførsler/Downloads** í valskránni til vinstru*
- *Dupultklikka á forritið*
  Smart ID Desktop App



4. Forritið verður lagt á telduna

*Nú verður **Smart ID Desktop App** lagt á telduna (installerað). Skermmyndin letur aftur av sær sjálvum, tá ið forritið er lagt inn. Tað kann taka nakrar minuttir.*

5. Samleikin á geyma er nú klárur at brúka á hesi telduni.



GG: Tú mást hava Smart ID Desktop App forritið á øllum teimum teldum, ið tú brúkar geyman á.